samleikin

# Umsókn um at knýta í Samleikan fyri tænastuveitarar

Hetta er umsókn, ið skal fyllast út, um ynski er at nýta Samleikan hjá Talgildu Føroyum.

Talgildu Føroyar reka og menna talgilda undirstøðukervið í Føroyum, sum er ætlað tænastuveitarum at veita trygt samskifti til viðskiftafólk síni. Samleikin er talgild loysn, sum tænastuveitarar kunnu brúka sum innritan til egnar talgildar tænastur.

Tá umsóknin er viðgjørd og góðkend, fáa tit boð frá Talgildu Føroyum, og farið verður undir næsta fyrireikandi stig.

Umsóknin skal sendast til talgildu@talgildu.fo

## Um tænastuveitara

Navn

V-tal

Bústaður

Teldupostur

## Stutt grundgeving

Hví vilja tit knýta í Samleikan?

## Slag av tænastuveitara

Vel hvat slag av tænastuveitara tit eru:

- ☐ Almennur stovnur
- ☐ Almennur grunnur
- ☐ Kommuna
- ☐ Vinnuligt felag
- ☐ Ikki viðkomandi

## Slag av skipan og umhvørvi

Greið frá hvør skipan og hvat umhvørvi, talan er um. Hvat er endamálið við skipanini, t.d. at melda til dagstovnapláss, fáa atgongd til kundaportal osfr.

Tal av brúkarum, ið brúka skipanina/tænastuna mánaðarliga.

Aldur á skipanini

Er skipanin netborin?

- ☐ Ja
- ☐ Nei

Hevur tænastuveitarin testumhvørvi til skipanina?

- ☐ Ja
- ☐ Nei

## Trygd

Talgildu Føroyar vilja vita, hvussu kt-trygdarmannagongdirnar hjá tænastuveitarum eru skipaðar. Um tænastuveitarin fremur trygdarskoðanir av onkrum slag, og um skjalfesting er tøk, sum váttar hetta.

Trygdarreglur eru fyri almennar stovnar við støði í Trygdarkunngerðini og í rundskrivi 9002 frá 29. apríl 2019 um kt-trygd. Sí meira her: [https://gjaldstovan.fo/Gjaldstovan/asetingar/rundskriv-um-kt-trygd/](https://gjaldstovan.fo/Gjaldstovan/asetingar/rundskriv-um-kt-trygd/)

Privatar fyritøkur hava aðrar reglur, og trygdarskjalfesting er viðkomandi í sambandi við, at tænastuveitari vil knýta í Samleikan. Eitt dømi er váttan 3402 frá ISO.

Fremur tænastuveitarin trygdarskoðanir?

- ☐ Ja
- ☐ Nei

Um ja, er nøkur trygdarváttan tøk?

- ☐ Ja
- ☐ Nei

Slag av trygdarváttan

Viðmerkingar annars um trygd

## Tekniska umboðið hjá tænastuveitara

Tænastuveitarin skal boða frá, hvør er tekniskt umboð. Tað kann vera starvsfólk á kt-deild, kt-ábyrgdari ella umboð frá kt-veitara.

Tá tænastuveitarin hevur knýtt í Samleikan, fær tekniska umboðið ein bronglaðan privatlykil frá Talgildu Føroyum. Talgildu Føroyar hava onga atgongd til privatlyklar hjá tænastuveitarum. Lykilin er ognin hjá tænastuveitaranum. Umboðið hjá tænastuveitaranum hevur ábyrgd av at ansa væl eftir lyklinum. Lykilin er avgerandi í mun til trygdina. Lykilin skal ikki liggja aðrastaðni enn ætlað, men bert á Shibboleth Service Provider servaranum.

Navn á tekniska umboðnum

Knýti til stovn ella fyritøku

Teldupostadressa

Telefon

samleikin

## Samskiftispersónur hjá tænastuveitara

Viðmælt verður at tænastuveitarin hevur eitt høvuðsumboð, sum samskiftir við Talgildu Føroyar um at knýta í Samleikan. Høvuðsumboðið hevur yvirskipaðu ábyrgdina og kann t.d. vera stjóri, deildar- ella verkætlanarleiðari. Høvuðsumboðið kann vera sami persónur, sum er tekniskt umboð.

Navn á samskiftispersóni

Leiklutur

Teldupostadressa

Telefon

## Váttan av treytum

Við at søkja um at knýta í Samleikan hjá Talgildu Føroyum, vátta tit at taka undir við rakstrartreytunum. Lesið treytirnar og ásetingarnar gjølla, áðrenn tit lata umsóknina inn. Treytirnar kunnu lesast í leinkinum niðanfyri:

[Treytir fyri tænastuveita at knýta í samleikan.]

_______________________________________________

Undirskrift

_______________________________________________

Dagfesting